Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Liljan Weihe, løgtingsmaður

Svarari: Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum

Evni: Vetrarfrí

Spurningar:

1. Nær kunnu næmingar og foreldur vænta at vetrarfrítíð verður sett í gildi?
2. Er ætlanin, at frívikan á vetri skal takast av summarfrítíðini hjá næmingunum, so hon verður stytt niður í 7 vikur?
3. Hvussu langt er landsstýrismaðurin komin í fyrireikingunum av vetrarfrítíðini?

Viðmerkingar:
Fólkaskúlanæmingar um alt landið eru farnir í summarfrí. Næstu 8 vikurnar skulu fyllast við upplivingum, samveru og hugna.

Trupulleikin er tó, at foreldrini hjá næmingunum hava ikki 8 vikur summarfrí – helst bara tríggjar samanhangandi vikur. Tað merkir, at hóast bæði foreldur taka tríggjar samanhangandi vikur, so eru børnini einsamøll í tvær, um tey ikki hava aldur til frítíðartilboð. Harafturat ber als ikki til at halda frítíð saman sum familja.

Um talan er um einligar uppihaldarar, so er uppaftur torførari at fáa frítíðina til at hanga saman.

Hjá næmingunum kann tíðin frá jólum til páskir ofta tykjast drúgv og myrk. Tí hevði ein steðgur á eini viku komið væl við hesa árstíð. Lærarar eru eisini forsprákarar fyri at stytta summarfrítíðina og ístaðin leggja eina fríviku myrku tíðina.

Í februar í ár var landsstýrismaðurin í miðlunum og boðaði frá, at arbeitt verður við at fáa vetrarfrí í fólkaskúlanum – møguliga longu frá komandi skúlaári.

Tí hesir spurningar.

Á Løgtingi, 23. juni 2023

Liljan Weihe